# 60 kilo av føroyskum tónleiki

**Tá Gissur Patursson leygarmorgunin um ellivu tíðina kom út til íslendska Ríkisútvarpið, at handa tað nógv ummrøddu fløgutaskuna, við einum savni av føroyskum fløgum, var ikki hissini av móttøku.**

AME-REYKJAVÍK
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*




*Taskurnar við teimum 60 kilounum*

Tá Gissur Patursson fór við flogfarinum til Ísland hevði hann 60 kilo av føroyskum fløgum við sær.

Talan var um tilsamans trý fløgusøvn, tað største og mest kompletta varð latið til Ríkisútvarpið, ið eisini er plátusavnið hjá Rás 2. Gávan til Ríkisútvarpið varð handa leygarmorgunin.

- Øll, ið starvast í plátusavninum vóru mótt upp við stjóranum Bjarna Guðmundssyni á odda, og hugnalig var løtan. Har varð borðreitt við kaffi og onkrum góðum afturvið, greiðir Gissur frá.

Hann sigur, at tey vóru sera glað fyri gávuna, ið hann vegna føroysku Gramex-deildina hevur tikið stig til at lata íslendskum útvarpi, og sum EIK og Expert hava stuðlað. Plátufelagið Tutl hevur latið største partin av savninum.

Gissur viðgongur, at hann faktiskt varð tikin á bóli av móttøkuni, og hvussu nógv varð gjørt burturúr hesum.

### Íslenskar fløgur til Føroyar

Gissur og útvarpstjórin hildu hvør sína røðu. Útvarpsstjórin bar fram í røðu síni eitt ynski um, at eisini føroyskt útvarp skuldi fáa eitt tílíkt kuffert. Í hesum sambandi fekk Gissur handaðar íslendskar fløgur at hava heim við sær til Kringvarpið. Gissur, ið sjálvur hevur verið útvarpsvertur í nógv ár, tók sjálvandi gleðiliga ímóti.

- Vit hoyra frá fólki, at tey bara fáa onkran tilvildarligan føroyskan tónleik, tá tey spyrja um eitt føroyskt lag. Umberingin er, at tað ikki finnist í plátusavninum, sigur Gissur. Hann vísir á, at tað sjálvandi ikki er ábyrgdin hjá Gramex at tryggja, at plátusøvnini hjá útvarpsstøðum eru komplett, men nú verður henda roynd gjørd.

- Talvan verður vaskað rein, og søvnini verða komplett. So taka við sjálvandi upplýsingar heim við okkum, um hvar føroyskir bólkar í framtíðini kunnu senda sínar útgávur, sigur Gissur.

Handanin av fløgutaskuni til Ríkisútvarpið varð send beinleiðis í útvarpinum, eisini tók sjónvarpið upp frá tiltakinum at senda í tíðindasendingini í gjárkvøldið.

Her varð eisini høvið hjá Gissi at gera eitt sindur av marknaðarføring fyri stóra AME tiltakið, ið var í NASA leygarkvøldið.

Áðrenn Gissur fór víðari avtalaðu tey, at hann í morgun skuldi koma og hjálpa teimum við at bólka føroyska tónleikin.

### Kristiligir tónar til Lindina

Umframt samlingina til Ríkisútvarpið hevði Gissur eina samling av øllum føroyskum kristiligum tónleiki, ið hann sunnudagin lat til kristiligu íslendsku útvarpsrásina Lindina.

Í Íslandi hevur verið eitt sindur frammi um fløgutaskuna, t.d. skrivaði Morgunblaðið um tað fríggjadagin. Tað var Arnar Eggert Thorddsen, ið skrivaði greinina í Morgunblaðnum. Tað var júst hann í fekk tríðja savnið av fløgu. Hetta er umfatandi savn við nógvum ymiskum føroyskum tónleiki. Arnar Eggert Thoroddsen er blað- og útvarpsmaður. Arnar, ið hevur vitjað Føroyar fleiri ferðir bæði í sambandi við Prix Føroyar, G!Festivalin og í sambandi við GBOB, er ein av mest virdu tónleikarummælarum í Íslandi og ein sera vælumtóktur útvarpsvertur.

### Tann rætti maðurin

Arnar Eggert Thoroddsen fer komandi mánaðirnar at venda sínum sjóneyku móti føroyskum tónleiki, og skrivað um og spæla føroysk verk.

Gissur handaði honum fløgusavnið leygardagin.

- Arnar er ein góður Føroyavinur, hann bað meg heilsa mangar ferðir og sendi eina serstaka heilsan til Gøtu. Hann helt hetta vera eitt gott dagført savn, at ummæla og geva víðari til góð heimildafólk, og takkaði hann so miriliga fyri heiðurin, at vit frá tónleikaheiminum í Føroyum høvdu valt at handa honum hetta savn. Eg eri tó sannførdur um, at hetta var júst tann rætti maðurin, sigur Gissur.

# Eivør og Teitur spældu saman

**Í vælumtóktu útvarpssendingini Poppland á íslendsku Rás 2, fekk føroyska AME tiltakið sera nógv rúm. Eivør og Teitur vóru á gátt og spældu nøkur løg harav eitt saman.**

AME-REYKJAVÍK
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Eivør var størsta føroyska stjørnan á AME-Reykjavík*
*mynd: Gissur Patursson*

Tað tykist ikki at vera nakar ivi um hvørjar stóru føroysku stjørnurnar eru í Íslandi í hesum døgum, sjálvandi er Eivør ein teirra, men Teitur tykist veruliga at hava lagt Ísland fyri sínar føtur, nú hann á fyrsta sinni vitjar tjóðina í vestri.

Í sendingini Poppland, ið varð send frá 12.45-16.00 fríggjadagin, varð fløgan Stay Under The Stars ummælt, av nógv virda ummælaranum Arnar Eggert Thorodsen, ið somuleiðis valdi at spæla tvey løg Don't Want You To Wake Up og You Get Me.

Seinni í sendingini vitjaðu Eivør og Teitur. Tey spældu tvey løg í part. Teitur spældi Louis Louis, ið seinastu vikuna er vorðin ein landaplága í Íslandi. Á heimasíðuni hjá Poppland verður sagt, at ein av orsøkunum til, at íslendska tjóðin hevur tikið Teit til sín, at Teitur hevur íslendskan abba. Teitur spældi eisini føroyska lagið Tú ert ein eingil. Eivør spældi Here Are The Angels og Grát ei, síðan spældu tey saman lagið Mær leingist. Eisini var práta við tey bæði føroysku listafólkini.

# Teitur í bestu senditíð



*Teitur í NASA*
*mynd: Gissur Patursson*

Teitur spældi í íslendskum sjónvarpi leygarkvøldið, hetta var í sendingini Kastljós í bestu senditíð beint eftir tíðindasendingina.
Kastljós varð endursend leygardagin, so íslendingar høvur ríkan møguleika at uppliva Teit.. Ið vitjar Ísland á fyrsta sinni í hesum døgum. Hann spældi leygarkvøldið saman við øðrum føroyskum tónleikarumí Nasa í sambandi við AME-Reykjavík.
Men restin av heiminum sleppur eisini at uppliva Teit spæla Louis Louis. Á heimasíðuni hjá Kastljós á síðu Ríkisútvarpsins liggur upptøkan við lagnum hjá Teiti. Hon kann upplivast við at fara inn á www.ruv.is/kastljos og velja sendingina 30. mars.
Í sendingini var eisini møguleiki at síggja brot úr nýggja sjónbandalagnm hjá íslendsku Eurovision divaini Sylviu Nátt

*nud*